52-006/2021

LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister's Office

Løgtingið

Svar
uppá

skrivligan fyrispurning nr. 52-006/2021 eftir tingskipanini § 52a til Bárð á Steig Nielsen, løgmann, frá Beintu Løwe Jacobsen, løgtingsmanni, um fjarskiftisøkið

Fyrispurningurin var soljóðandi:

1. Hvørja ávirkan hevur danska stjórnin/Fólkatingið á nýggju lóggávuna á fjarskiftisøkinum, sum løgmaður vísir á í ólavsøkurøðuni, og sum verður mett at verða trygdar- og verjupolitikkur?

2. Hvørji onnur yvirtikin málsøki eru, ið verða mett at koma undir trygdar- og verjupolitikk?

3. Hevur danska stjórnin ynskt at vera inn yvir lóggávuna á fjarskiftisøkinum?

Svar:

Til 1. Nýggja tíðin har tøknin tekur seg fram og verður ein meira týðandi partur av okkara gerandisdegi, har talgildingin og sjálvvirkandi skipanir verða meira vanligar, krevur dagførdar lógarkarmar, ið tryggja fólkinum móti ótilætlaðum hendingum ella brúki av upplýsingum. Eins og onnur lond hevur Danmark í hesum sambandi fingið nýggja lóg um veitaratrygd á fjarskiftisøkinum.

Danski forsætismálaráðharrin hevur mótvegis løgmanni sett fram ynski um at líknandi lóggáva eisini verður sett í gildi fyri Føroyar. Innihaldsliga hevur løgmaður verið samdur við forsætismálaráðharranumum, at neyðugt er við líknandi lóggávu í Føroyum.

Donsku sjónarmiðini eru, at her er talan um uttanríkis-, trygdar- og verjupolitikk, sum ikki kunnu yvirtakast eftir yvirtøkulógini, og tí eigur at verða lóggivið við ríkislóg. Føroyskir myndugleikar hava hinvegin víst á, at økið kemur undir fjarskiftisøkið, handil, ella annað yvirtikið málsøki, og tí kann lóggevast við løgtingslóg. Harumframt verður frá føroyskari síðu ført fram, at siðvenja hevur verið, at man á einum yvirtiknum málsøki við løgtingslóg kann koma inn á eitt felagsmálsøkið, um hetta er natúrligur liður í lóggávuni av sermálsøkinum annars.

Lóggávumálið tykist nú at vera steðgað eitt sindur upp, hóast báðir partar eru samdir um, at tað skal lóggevast á økinum.

Tinganes · FO-100 Tórshavn · Faroe Islands
Tel. +298 306000 · Fax +298 306015 · info@tinganes.fo · www.tinganes.fo

Tingast verður framhaldandi við danir um at finna eina virðiliga loysn. Nýggja danskt-føroyskt-grønlendska samstarvsráðið á trygdarpolitiska økinum, við ráðharrum úr teimum trimum londunum, fer eisini at verða eitt upplagt forum at viðgera spurningin í.

Tað eru semjusøkjandi tíðir í ríkisfelagsskapinum. Øll trý londini vilja finna skilagóðar loysnir - eisini á uttanríkispolitiska økinum, har ríkisfelagsskapurin má dagførast.

Fyri at taka saman um, so eru vit í eini samráðingartilgongd, men tað skal eingin ivi vera um, at tað eru vit í Føroyum, sum hava síðsta orðið, tá ið tað kemur til innihaldið í lógini og sjálvan lógartekstin.

Til 2. Tað vil ofta vera so, at markamót eru millum føroysk og donsk málsøki. Í flestu førum verða tey loyst í sátt og semju partanna millum.

Heimastýrislógin hevur í § 6 greiðar mannagongdir fyri hvussu trætur í hesum sambandi skulu loysast.

Men í tey út við 75 árunum sum heimastýrislógin hevur á baki er ein sonevnd § 6 nevnd ongantíð sett. Føroyingar og danir hava í ivaførum tosað seg til rættis.

Danir hava verið lagaligir í sínum tulkingum. Føroyingar hava løgtingslóggivið inn á øki sum annars kundu hava verið roknað at hoyra til uttanríkis-, trygdar- og verjupolitikk.

Dømi um hetta er, at í fyrisitingarløgtingslógini og løgtingslógini um alment innlit, er ásett at innlit kann avmarkast vegna trygdar- og ríkispolitisk áhugamál. Eisini eru fleiri løgtingslógir um forboð fyri handli við ávís lond vegna ST trygdarráðsavgerðir um hetta. Við løgtingslóg eru ásettar reglur í revsilógini um revsing fyri brotsverkum móti "øverste danske statsorganer, folketing, højesteret og dronningen." Í frástøðubannslógini eru við løgtingslóg ásettar rættargongureglur um slík mál, hóast tað at rættargonguviðurskifti ikki eru yvirtikin.

Trygdarpolitiska økið er ikki statiskt, men flytur seg alla tíðina so hvørt samfelagið broytist og mennist.

Í gomlum døgum var býarplanlegging, veðurforsagnir og kortlegging av avgerandi týdningi, og hetta var roknað sum hernaðarmál. So hvørt sum tøknin hevur ment seg, verður hetta í stóran mun ikki longur roknað sum hernaðarmál. Myrkalegging var av altavgerðandi týdningi fyrr í krígsstøðu, í dag ger GPS tøkni og varmasøkjandi myndatól, at hetta er hernaðarliga týdningarleyst.

Nú verða teldutrygdarviðurskifti roknað fyri at vera sera týdningarmikil í hernaðarhøpi. Hetta er helst ikki so óvæntað. Í síni tíð vóru telegrafviðurskifti eisini av størsta hernaðartýdningi.

Til 3. Víst verður til svar uppá fyrsta spurning.

Í Tinganesi, 16. august 2021

Bárður á Steig Nielsen
løgmaður